# KOYRISKÚLIN Í MIÐBÝNUM

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar mánadagin 25. apríl 2005 kl. 17.00

Avgreiðir øll koyrikort

NIELS P. OLSEN
TEL 31 00 10 · FARTEL 22 30 41

BJARKI JOHANNESEN
TEL 31 48 45 · FARTEL 21 48 45

ÓLAVUR ARGE
TEL 31 40 02 · FARTEL 21 40 02

MARNAR ANDREASEN
TEL 31 43 81 · FARTEL 21 43 81

Sosialurin 341800



Visti tú ikki tað? Sosialurin


TÓRSHAVNAR KOMMUNA

*Endurlýsing*



## Byggiharrasamskipari

Søkt verður eftir samskipara at leiða og samskipa arbeiðið at gera nýggjan fólkaskúla í Hoyvíkshaganum.

Arbeiðisuppgávurnar eru m.a. at:

- seta í gongd verkætlanina
- samskipa projektering og útbjóðing, sum partur av projektleiðsluni, sum partur av projektleiðsluni
- samskipa ráðgevingararbeiðið
- standa fyri byggileiðsluni
- hava eftirlit við arbeiðinum
- gera byggiroknskap og tíðarætlan
- gera tilmæli til kommununa
- samskipa útvegan av innbúgvi, útgerð og innflytan

**Førleikaprógv**
Vit hugsa at tú kanst vera útbúgvin byggifrøðingur, verkfrøðingur, arkitektur ella, at tú hevur royndir innan vinnuna, ið geva tær førleika at reka hetta avbjóðandi starvið. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir við eftirliti, byggileiðslu, byggiroknskapi og projektleiðslu.

**Persónligir eginleikar**
Neyðugt er at duga væl at arbeiða sjálvstøðugt, at fyrisita, samskifta og bera fram.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er projektsett og tíðaravmarkað til í mesta lagi 3 mánaðir eftir at verkætlanin er lokin. Starvið er lønt sambært sáttmála millum Verkfrøðingafelag Føroya/Føroya Arkitektafelag við viðbót á 10 stigi.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. mei 2005. Viðmerk umsóknina “Byggiharrasamskipari".

**Nýggi skúlin í Hoyvík**

Nýggi fólkaskúlin í Hoyvíkshaganum verður ein 2-sporaðan fólkaskúla til 1. - 9. flokk við frítíðarskúla til 1. og 2. flokk.

Økið, ið er lagt av til nýggja skúlan, er eystan fyri Løgmannabreyt, niðan fyri innkoyringina til útstykkingina, ið nú er í gerð.

Grundøkið er 17.600 $m^2$ og bygningurin verður umleið 5.600 $m^2$ til støddar

- onnur leys størv?

Hygg á www.torshavn.fo

---

Arbeiðseftirlitið
Falkavegur 6
110 Tórshavn

# Eftirlitsfólk

## Endurlýsing

Tlf.: 357811
Fax: 357810
arb@arb.fo

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt starv á Arbeiðseftirlitinum leyst at søkja í tíðarskeiðnum frá 1. mai 2005 til 1. apríl 2006. Arbeiðstíðin er 75 % av fullari tíð. Arbeiðsøkið fevnir um alt landið, men hevur viðkomandi tilhald í Tórshavn.

**Útbúgving**
Fyrimunur er at hava útbúgving sum fysio-/ergoterapeutur ella maskinmeistari, men onnur hava eisini møguleika at søkja

**Arbeiðið**
Viðkomandi, sum settur verður í starvið, kemur at arbeiða ógvuliga sjálvstøðugt, men í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini á Arbeiðseftirlitinum.

Viðkomandi kemur at taka sær av øllum vanligum eftirlitsarbeiði hjá Arbeiðseftirlitinum og luttaka í okkara skeið- og kunningararbeiði.

**Løn**
Lønin verður sambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Føroya Landsstýri.

**Annað**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arbeiðseftirlitið, tlf. 357811 og tosa við Elinborg á Lofti.

Skrivlig umsókn við próvskjølum og møguligum ummælum skal vera Arbeiðseftirlitinum í hendi í seinasta lagið 26. apríl 2005.

Ætlandi verður starvið sett 1. mai ella skjótast til ber.

*Arbeiðseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum høvuðsuppgávu at umsita løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi. Harumframt umsitur Arbeiðseftirlitið lóg um spreingievni, kavaravinnu og løggildar vektir og nøgdarmátarar. Arbeiðseftirlitið hevur skrivstovu í Tórshavn, har 12 fólk starvast.*

**Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningum um arbeiðsumhvørvi, at:**

1. vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenninginum í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisligan týdning,
2. hjálpa landsstýrismanninum við fyrireikingunum av reglunum sbrt. lógini,
3. áseta nærri fyriskipanir við heimild frá landsstýrismanninum,
4. kunna seg um teknisku og sosialu menningina í samfelagnum við atliti til at betra um arbeiðið, hvat trygd og heilsu í arbeiðs-umhvørvinum viðvíkur,
5. viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, tøknilig hjálpartól v.m., evni og tilfar og geva loyvi, sum eru í samsvari við lógina ella fyrisitingarligar reglur,
6. ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

Sosialurin 341800

---

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki / málsviðgera til Akfaradeild at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt parttíðarstarv.

**Uppgávan:**
Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Umsiting og avgreiðsla av skrásetingargjøldum
- Skráseting av akførum

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi og kundavinaligur. Tað er ein treyt, at viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Hans J. Stenberg, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2005.

Sosialurin 341800

**Bileftirlit Føroya** | Hoyvíksvegur 57 · Postsmoga 3206 · 110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, vegskatt og skrásetingargjøld. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 19 fólk.*

WWW.SOSIALURIN.FO